# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Sjúkrarøktarfrøðingar til Psykiatriska depilin

Á Psykiatriska deplinum, **D2** eru hesi størv í skiftandi vaktum leys at søkja til setan 1. november 2007 ella skjótast gjørligt:

- eitt farloyvisstarv á starvsbrøki 1,0 til og við 31. august 2008
- eitt fast starv á starvsbrøki 0,7

Deildin er ein akut viðgerðardeild við nógvum avbjóðingum.Vit raðfesta samarbeiði og trivna høgt, og at starvsfólkið er í støðugari menning. Arbeitt verður áhaldandi við dygdarmenning av viðgerðini og umhvørvinum á deildini.

Vit starvast sum sjúkrarøktarfrøðingar, pleygarar og heilsurøktarar og arbeiða við kontaktpersónskipan og eftir miljøterapeutiskum meginreglum. Vit hava tætt samstarv við aðrar fakbókar, bæði innan- og uttanhýsis.

**Vit ynskja, at tú hevur**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- góð samstarvsevni
- hug at arbeiða við psykiatriskari sjúkrarøkt
- evni at "halda høvdið kalt" tá stendur á
- helst royndir innan psykiatriska sjúkrarøkt

**Vit kunnu bjóða tær**
- eitt dynamiskt, fjølbroytt og mennandi arbeiði
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- tvørfakligt samstarv
- ávirkan á fakligu menningina
- góða innleiðslu

Nærri fæst at vita við at ringja 304500 til Birgit Andersen, deildarleiðara á D2, lokal 4002, BiAn@lsh.fo ella til Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 4102, bergitw@lsh.fo

**Umsóknarfreistin er** 19. oktober 2007 kl. 12.00

## Onnur Størv (sí meira á www.lsh.fo)

**Reingerðarfólk til Reingerðardeildina**
Umsóknarfreistin er 8. oktober 2007

**Sjúkrarøktarfrøðingur til B6**
Umsóknarfreistin er 8. oktober 2007 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingur til B8**
Umsóknarfreistin er 8. oktober 2007 kl. 12.00

**Yvirlæknar til Psykiatriska depilin**
Umsóknarfreistin er 8. oktober 2007 kl. 12.00

**Introduktiónsstarv í Psykiatri**
Umsóknarfreistin er 8. oktober 2007 kl. 12.00

**Leiðandi yvirlækni til Skurðdepilin**
Umsóknarfreistin er 10. oktober 2007

**Sálarfrøðingur til Psykiatriska depilin**
Umsóknarfreistin er 22. oktober 2007

**Bioanalytikari**
Umsóknarfreistin er 15. november 2007 kl. 12.00

**Leiðandi yvirlækni til Medisinska depilin**
Umsóknarfreistin er 22. november 2007

**Læknaskrivari/hjálparfólk til arkivið á Bráðdeplinum**
Umsóknarfreistin er 12. oktober 2007 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingar til Føðideildina**
Umsóknarfreistin er 12. oktober 2007 kl. 12.00

**Læknaskrivarar til Bráðdepilin**
Umsóknarfreistin er 15. oktober 2007 kl. 12.00

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Umsóknin skal vera Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:
**Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO 100 Tórshavn**







## Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo

